

# Nógvir pengar í Mærsk-grunninum

**Jan Müller**

08.06.2014 - 10:02

Oljan.fo

Hóast tann sokallaði Almenfonden hjá A.P. Møller-Mærsk forvann eina milliard krónur minni í 2013 enn árið fyri, er pengakassin hjá fyritøkuni um at bresta av pengum.

Grunnurin, sum av røttum eitur A.P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond, er høvuðspartaeigari í Mærsk-fyritøkuni, og tað var stovnarin sjálvur, A.P. Møller, sum stovnaði hann við tí endamáli, at fyritøkan framhaldandi skuldi rekast í sama andanum. Tá Mærsk McKinney Møller doyði í 2012, tók dótturin, Ann Mærsk Mc-Kinney Ugla, við.

Gongdin hjá grunninum hevur verið góð, hóast tað seinasta árið ikki hilnaðist so væl. Í 2013 forvann grunnurin 8,4 milliónir krónur ímóti 9,2 milliónum krónum í 2012. Orsøkin var í høvuðsheitum, at grunnurin fekk minni enn væntað burtur úr íløgunum í Mærsk-fyritøkuni.

Men kassin er væl fyri, og eginognin var á nýggjárinum góðar 94 milliardir krónur. Grunnurin heldur tann gamla siðin at stuðla ymsum tiltøkum. Í fjør lat hann góðar tvær milliardir krónur til góð endamál, harav tann danski fólkaskúlin fekk eina milliard.